# HEILSANIR



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum. Takk fyri alt tú ert fyri meg.
**Heilsan Jóannes**



**Góði Kári**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Karin**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 28. juni. Eisini ein heilsan til Jóhan. Jesus pápi verið við tykkum.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Karin**
Omma og abbi í Gøtu ynskja tær hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 28. juni. Eisini ein heilsan til Jóhan. Jesus pápi verið við tykkum.



**Góða Karin systi**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 28. juni. Jesus pápi verið við tær.
**Ynskir Jóhan**



*Vera hon er well – ja, Vera er well – tað vil hon altíð verða.*



Góða wella Vera! Hjartaliga tillukku við 40 ára degnum
**Ynskja gita hvør ;)**


Sosialurin
*Heilsanir*
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ____________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Bygd/býur: ____________ Tlf.: ____________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:

Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Fysioterapeutur

Søkt verður eftir fysioterapeuti til fysioterapideildina á Landssjúkrahúsinum frá 31. juli til og við 31. desember 2006. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Málbólkurin er sjúklingar, innlagdir á Landssjúkrahúsinum og vegleiðing av sjúklingum, sum koma ambulant á Landssjúkrahúsið til viðgerð og vegleiðing.

**Fysioterapeutiska arbeiðið á Landssjúkrahúsinum er at:**

- Leggja til rættis, gjøgnumføra og samanhangandi eftirmeta málrættaðað viðgerðar- og rehabiliteringsupplegg í samstarvi við brúkara, avvarðandi og onnur starvsfólk.
- Kunna og vegleiða sjúklingin við tí endamáli at økja um hansara egna fysiska-, psykiska- og sosiala tilfeingi. Hetta at fremja nýtsluna og menningina av tilfeinginum og at afturvinna ella betra um funktiónevni, førleikamøguleika og lívsvirðið.
- Seta í verk tiltøk og hættir, sum ávirka kroppsligu støðuna hjá sjúklinginum fyri gjøgnum hetta, at betra um sálarligu heilsustøðuna og sosiala virkisevnið.
- Undirvísa og vegleiða starvsfólk á Landssjúkrahúsinum í fysioterapeutiskum kjarnuveitingum

**Á fysioterapideildini** eru 12,0 fulltíðarstørv býtt yvir yvirfysioterapeut, deildarfysioterapeut, fysioterapeutar og sjúkrahjálpara, í alt 15 fólk.

**Vit søkja eftir** einum fysioterapeuti við áhuga og kunnleika at arbeiða á sjúkrahúsi. Vit vænta, at tú ert ágrýtin, hevur góð samstarvsevni, er opin og ert til reiðar at arbeiða neyvt saman við starvsfólkunum her.

Á Landssjúkrahúsinum verður í løtuni arbeitt við at broyta leiðslubygnaðin. Hetta ber í sær, at ergoterapideildin og fysioterapideildin verða ein rehabiliteringseind undir medisinsku depilsleiðsluni.

**Fleiri upplýsingar** um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a. fáast við at venda sær til Karin Djurhuus, virkandi yvirfysioterapeutur, á tlf. 304599, lok 5790.

**Løn- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Fysioterapeufelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 17. juli 2006 kl 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skivlig umsókn,** merkt »umsókn til starv«, við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*